gult cyan magenta svart



# Vatn heldur enn olju

*Hydraulikkur rikin við vatni heldur enn olju er framtíðin, heldur gøtumaður, sum er farin undir virkisbygning, har hann ætlar at framleiða lutir til vatnhydrauliskar maskinur*

EDVARD JOENSEN

**Norðragøta:** At vit í framtíðini fara at síggja ymsar hydrauliskar maskinur og spøl verða rikin við vatni í staðin fyri olju, ivast Jostein Petersen í Gøtu ikki í. Tí er hann farin undir at byggja høli at framleiða lutir til hesi tól.

Í grótbrotinum í Norðragøtu stendur beinagrindin til ein virkisbygning. Tveir lastbilar arbeiða við at taka eina leysa last burtur. Ein maður gongur millum bilarnar og peikar og skipar fyri. Tað er Jostein Petersen í Syðrugøtu, sum er maðurin aftan fyri hallarbyggingina.



*Nýggja smiðjan í Norðragøtu skal gera lutir til nýggja tøknifrøði*

**Mynd: Edvard Joensen**

Talan er ikki um nakran traditionellan smiðjubygning, vit her standa við. Her skal gerast ein smiðja, sum ætlandi skal framleiða lutir til aðrar, størri framleiðarar, sum fara at gera spøl og maskinur, sum riknar verða hydrauliskt við vatni heldur enn olju.

Jostein Petersen sigur, at arbeitt hevur verið eina tíð við hesum ætlanum. Hann hevur ferðast úti í heimi og kunnað seg um viðurskiftini á økinum. Hvør ger hvat. Hvussu langt komið er. Og ikki minst hvussu marknaðurin er.

Hann sigur, at danska stórfyritøkan Danfoss er komin eina longst við at gera hesar hugsanir til veruleika. Og hann hevur so fingið eitt ávíst samstarv í lag við Danfoss. Soleiðis at skilja, at tá smiðjan í Norðragøtu er liðug, er ætlanin at fara at framleiða komponentar, sum Danfoss skal brúka í síni framleiðslu. Hetta verður gjørt ásannandi, at tað verður tungt at fara at kappast við slíkar risar. Tá er betri at samstarva við teir.

Jostein Petersen sigur, at tað verður helst serliga í matvøruídnaðinum, at vatnhydraulikkur verður vanligur. Og júst matvøruframav møguligum lekum.

Jostein Petersen sigur, at byrjanin kann kanska tykjast eitt sindur dýr, tí rustfrí rør fara at verða brúkt. Men tað man fara at koma innaftur, heldur hann. Hann sigur, at gingið verður meira og meira burtur frá at hava horn og krókar. Alt skal vera so avrundað sum gjørligt. Eisini fyri at vera lætt at halda reint.

Jostein Petersen, sum er verkfrøðingur, hevur arbeitt hjá norsku Brattvåg fyritøkuni, sum hevur latið mongum føroyingi hydraulisk spøl. Bæði línu- og trolspøl.

Tað var, meðan hann var hjá Brattvåg, at Jostein Petersen fór at hugsa um at brúka vatn í staðin fyri olju í hydraulikkinum.

-Ikki tí, at tað er nakað nýtt. Vatn var tað fyrsta, sum brúkt varð til orku, sigur hann.

Men sum alt annað, ið roynt verður nýtt, fara eisini tekniskir trupulleikar at vísa seg her. Danfoss hevði tíggju ár frá tí, byrjað varð at granska, til nøkunlunda skil var í spølunum. Og Jostein Petersen væntar, at onkur trupulleiki man fara at koma aftrat, sum vinnast skal á, áðrenn rættiliga kann farast í gongd.

Jostein Petersen sigur, at hann ætlar at leggja seg eftir serframleiðslu, sum kann seljast til teirra, sum framleiða tær lidnu maskinurnar. Talan verður tá um útflutning.

Hvussu stór íløgan í verkætlanina er, vil Jostein Petersen ikki upplýsa. Men hann væntar, at hon kann geva nøkur arbeiðspláss, tá alt er komið í gongd. Tí hann væntar, at tá vøran er á marknaðinum, skal tørvurin nokk fara at vísa seg. Tørvurin er har longu nú, men vit kenna hann ikki rættiliga, fyrr enn vit hava okkurt at nøkta hann við.

# Írar skifta spøl í Fuglafirði

*Ein stórur, írskur nótabátur liggur í løtuni á Fuglafirði og skiftir spøl. Arbeiðið verður gjørt av KJ-Hydraulikk á Kambsdali*

EDVARD JOENSEN

**Kambsdalur:** Teir hava stórarbeiði í gongd hjá KJ-Hydraulikk í løtuni. Eitt írskt og tvey føroysk skip standa á ordralistanum.

Tað liggur eitt stórt reytt skip á Fuglafirði. Einki óvanligt í tí. Tað stendur Dublin á reyvini. Heldur einki óvanligt. Tí írar landa javnan til Havsbrún.

Men hetta skipið landar ikki. Uttan tað ganga smiðir aftur og fram um landgangin.

Jú, Western Endeavour úr Dublin er í Føroyum og skiftir spøl. KJ-Hydraulikk á Kambsdali ger arbeiðið.

Jón Elisasen, verkstaðsleiðari há KJ-Hydraulikk, sigur, at teir hava fingið arbeiðið í kapping við útlendingar. Skipið plagar av og á at landa í Fuglafirði, og tann vegin eru teir komnir at kennast. Tá so fiskivinnumessan var í Glasgow í vár, hitust umboð fyri reiðaríið og smiðjuna aftur. Tá varð tosað um, at skipið skuldi skifta spøl, og KJ-Hydraulikk beyð upp á arbeiðið. Teir fingu tað í kapping við millum aðrar norðmenn.

Arbeiðið umfatar skift av tveimum trolspølum og einum dekkspæli. Umframt skifta teir motorar í einum fjórða spæli. Talan er um arbeiði fyri einar 600.000-700.000 krónur, sigur Jón Eliasen. Talan er um RAPP spøl, sum KJ-Hydraulikk hevur umboðað í Føroyum í meira enn 20 ár. KJ-Hydraulikk ger tó hesum førinum bara sjálvt arbeiðið. Reiðaríið hevur sjálvt keypt spølini og flutt tey til Føroya.

Arbeiðið byrjaði fyri umleið 14 døgum síðan og skal vera liðugt um mánaðarskiftið.

Hetta er fyrstu ferð, KJ-Hydraulikk ger so stórt arbeiði fyri útlendingar, hóast teir vanliga arbeiða umborð á útlendskum skipum.

Eisini onnur størri areiði eru í gongd í løtuni, sigur Jón Eliasen, verkstaðsleiðari hjá KJ-Hydraulikk.

Teir skifta høvuðsmaskinu í Fuglfirðingi, sum liggur á Fuglafirði. Hann fær eina brúkta Callesen maskinu setta í. Eisini skulu teir skifta kranan hjá skeljatrolaranum Norðheim av Oyri út. Tað arbeiðið skal vera liðugt, til skeljatíðin byrjar aftur í heyst.

Tað arbeiða í løtuni 50 fólk hjá KJ-Hydraulikk á Kambsdali.



*Western Endeavour liggur á Fuglafirði og skiftir spøl*

**Mynd: Edvard Joensen**



*Westfreezer fer til Grønlands at fiska svartkalva*

**Mynd: Edvard Joensen**

# Til Grønlands eftir svartkalva

**Miðvágur:** Westfreezer úr Miðvági fer um hálvan august undir Vesturgrønland at royna eftir svartkalva. Kvotan er 280 tons.

Tummas Jacob á Løgmansbø, skipari, sigur, at fiskiskapurin eftir svartkalva undir Vesturgrønlandi er hampiliga góður í løtuni, eftir sum tað frættist frá. Og prísurin er so góður, sum hann helst ongantíð fyrr hevur verið, sigur Tummas Jacob á Løgmansbø. Han sigur, at prísurin í løtuni liggur umleið 30 krónur fyri kilo.

Føroyingar hava roynt eftir svartkalva fyrr, men ikki so nógv við línu, sigur skiparin á Westfreezer. Hann sigur tó, at sjálvur kennir hann til fiskiskapin frá Labrador.

Teir eru 16 mans við skipinum, sum hevur roynt undir Føroyum og Íslandi, síðan tað kom til Føroya. Manningin verður tann sama, nú farið verður til Grønlands.

Tummas Jaob á Løgmansbø letur hampiliga at gongdini higartil í ár. Tað hevur gingið væl betri, enn í fjør, sigur hann.

Westfreezer er frystiskip, sum frystir alla veiðina umborð. Teir hava selt um uppboðssøluna, sigur Tummas Jacob á Løgmansbø.

Teir hava ikki gjørt nakra søluavtalu við nakran, nú áðrenn teir fara til Grønlands, sigur skiparin.

Í løtuni er Westfreezer á sleipistøð, har hann verður pussaður upp.

**ej**

gult cyan magenta svart





# Laksurin er komin

*Laksurin fer nú niðan í áir og vøtn eftir at hava bíðað eftir regni í fleiri dagar*

EDVARD JOENSEN

**Skálafjørður:** Kristian fekk sín fyrsta laks nakrantíð á sandinum í Skálafirði mikudagin.

13 ára gamli Kristian Johannesen úr Klaksvík var farin í Skálafjørð við abbanum at fiska hendan dagin. Abbin hevði verið onkran dag fyrr og fingið onkran laks. Hann fekk eisini ein fyrrapartin mikudagin. Men Kristian hevði ongantíð enn fingið nakran.

*Trettan ára gamli Kristian úr Klaksvík fekk sín fyrsta laks mikudagin*

**Mynd: Edvard Joensen**

Til á middegi mikudagin. Tá bar til. Hann kom fastur í ein laks fyri sandinum í Skálafirði, og hann fekk hann. Ein flottur, blankur fiskur upp á eini fýra-fimm pund. Nýkomin av havinum við nógvari lús. Blankur og reinur við øllum fjarðunum og heilum sterti. Avgjørt eingin útsloppin alifiskur.

Eisini aðrastaðni er laksurin komin. Og sílaveiðimenn láta væl at. Teir siga, at tað hevur ikki verið so nógvur laksur at sæð í nógv ár, sum tað er nú.

Tað hevur verið óvanliga turt í summar, so at kalla einki er niðankomið. Í Leynum vóru menn frá Sílaveiðifelagnum herfyri og tóku fisk til at strúka. Og teir siga, at tað er heilt væl til. Týsdagin regnaði, og tá varð sagt, at væl kom niðan. Tað frættist, at einir fýra fiskar vóru fingnir á Leynavatni.

Eisini siga sílaveiðimenninir, at tað er nógv meira til av sjósílum, enn tað hevur verið seinnu árini.

Hvør orsøkin er, til at fiskurin kemur aftur, vita teir ikki at siga. Men teir siga frá somu gongd í grannalondunum Noreg og Skotlandi.

# Bygdarmynd horvin

*Seinasta leivdin av sildatíðini í Kollafirði hvarv hósmorgunin, tá gamla sildahúsið inni á Langasandi varð tikið niður*

EDVARD JOENSEN

**Kollafjørður:** Gamla, hvíta sildahúsið, sum hevur staðið eftir sum tað seinasta minnið um sildatíðina á Langasandi í Kollafirði, mátti hósmorgunin víkja fyri nýggju tíðini.

Við tí ber til at siga, sum skrivað stendur: »Tað gamla er farið, sí alt er vorðið nýtt.«

Hans Jacob Hansen, bygdarráðsformaður í Kollafirði, sigur, at Kollafjarðar Kommuna hevur keypt húsini frá Eileri Jacobsen í Havn við tí endamálið at taka tey niður. Har var vorðið ov trongligt á økinum, og tí varð avgjørt at rudda økið, sum so kann brúkast til bingjupláss og tílíkt.

Nógv virksemið er annars á havnarøkinum á Langasandi í Kollafirði. Uttan fyri virkið hjá Vestsalmon er stórarbeiði í gongd í løtuni. Gjørt verður stórt bryggjupláss at seta frystihotellið á. Tað arbeiðið gongur eftir ætlan, sigur Hans Jacob Hansen.



*Seinasta leivdin av sildatíðini á Langasandi hvarv hósmorgunin*

**Mynd: Edvard Joensen**

Bygdarráðsformaðurin í Kollafirði sigur annars, at klárt er at spreingja fyri skúlanum og ítróttarhøllini, sum verða bygd upp í verandi skúlan í Kollafirði. Tað grótið, sum haðani kemur, skal so brúkast til ífyllu á havnarlagnum.

Annars skal allur bygdarvegurin í Kollafirði asfalterast í summar, sigur Hans Jacob Hansen. Hann sigur, at teir hava fingið játtan frá Landsverkfrøðinginum um at gera arbeiðið. Men í løtuni er feriutíð, so enn er tað ikki reiðiliga komið í gongd.

Vatnverkið virkar sum tað skal. Hóast turkin hevur ikki verið nakar trupulleiki við vatni í Kollafirði, sigur bygdarráðsformaðurin. Nýggju vatnbrunnarnir eru tiknir í nýtslu, og tann gamli er til at taka. Tað var tó neyðugt einaferð í summar at pumpa vatn úr gamla brunninum niðan í teir nýggju. Hetta var gjørt fyri at fáa vatnið gjøgnum reinsiverkið, sum gjørt er í samband við nýggju vatnveitingina, sigur Hans Jacob Hansen, bygdarráðsformaður í Kollafirði.